# Kappingin fer við hálvum triðja tíma

***Kappróður:** Tað ber bara til at avmarka tíðina uppaftur meiri, um allar kappingarnar verða á eitt túsund metrum*

Fyrsti FM kappróðurin var í Klaksvík leygardagin. Líkindini vóru av teimum fagrastu, og alt gekk upp á stás. Í ongum av teimum seks kappingunm var neyðugt við innleiðandi róðrum, og tað var bara í 10–mannafarakappingini, at tað var neyðugt við nýggjum starti. Havnarbáturin reyk avstað, áðrenn skotið hjá dómaranum gekk av, og so skutu teir róðurin av.

Fyrsta startskotið gelti millum Klakkin og Kjølin, tá klokkan bara var farin nakrar heilt fáar minuttir av trý, og tá gestablíði Klaksvíkingurin kom á mál, eftir at hann hevði latið allar hinar koma á mál fyrst, var klokkan nakrar fáar minuttir í hálvgum seks.

Tað vil siga, at tað tók tveir og ein hálvan tíma at fáa alla kappingina frá hondini. Hetta er væl betri, enn tað var á norðoyarstevnu í fjør. Ta ferðina var klokkan sjey, tá 10–mannaførini vóru liðug at rógva, og niðurstøðan var, at umstøðurnar, sum tað bar til at gera nakað við, skuldu betrast. Hetta arbeiðið er gjørt, og í Róðrarsambandinum eru teir væl nøgdir við tað, sum gekk fyri seg á vánni í Klaksvík.

Undanfarin ár hevur tað fleiri ferðir verið nevnt, at um kappróðurin skal gerast uppaftur meiri vinarligur hjá teimum, sum standa kring róðrarøkið og fylgja við, so skal samlaða kappingartíðin styttast niður um tveir tímar.

Á norðoyarstevnu vóru teir ein hálvan tíma frá tí, sum hevur verið arbeitt fram ímóti. Og tað var sera sjónskt, hvør orsøkin var til, at tað ikki eydnaðist at fáa alt frá hondini upp á gott og væl ta tíðina, sum tað tekur at spæla ein fótbóltsdyst.

5–mannaførini við dreingjum og gentum og 6–mannaførini við kvinnum róðu eitt túsund metrar. 6–mannaførini við monnum, 8–mannaførini og 10–mannaførini róðu fimtan hundrað metrar. Tíðin til hvønn róðurin var gott og væl eitt korter. Men ímillum síðsta róðurin á eitt túsund metrum og fyrsta róðurin á fimtan hundrað metrum fór ein góður hálvur tími. Hetta var tíðin, sum tað tók at flyta fasta startin.

Tað plagar at verða sagt, at so hvørt sum róðrarárið líður, so styttist tíðin, sum fer at leggja bátarnar. Orsøkin verður søgd at vera, at manningarnar gerast alt betri fyri – eisini at akta startdómaran og høvuðsdómaran og at halda nervarnar í teymum.



*Skal tíðin til avgreiðing av róðrunum styttast meira, er einasta loysnin at rógva sama mál allar róðrarnar*
***Mynd: Jonhard Hammer***

Á ólavsøku er kappróðurin ofta liðugur góðan hálvan annan tíma eftir, at fyrstu tøkini eru tikin. Ein orsøk til hetta er, at fasti starturin altíð roynist væl á ólavsøku, og ein onnur orsøk er, at fasti starturin ikki verður fluttur. Allir bátarnir rógva sama teinin.

Kappróðurin á norðoyarstevnu vísti, at um tað skal bera til at avmarka tíðina uppaftur meir, so skulu allar kappingarnar vera á eitt túsund metrum.

Ein møgulig broyting hevði havt nógvar avleiðingar. Kappróðrarfólk og tey, sum fyrireika og ansa eftir fara ivaleyst at taka spurningin uppaftur í framtíðini. Og kanska fara teir í eftirmetingini av kappingini á norðoyarstevnu at koma fram á onkrar lutir, sum – um teir vóru rættaðir eitt sindur – kundu stytt kappingina uppaftur meiri. Men tað verður sera torført at sleppa niður um tveir tímar, um ikki allar kappingarnar verða á eitt túsund metrum. Og so er spurningurin, hvat tað verður lagdur størstur dentur á – tíðina ella fyritreytirnar á ymsu róðrarteinunum.

JH

# Argjabáturin aftur í hopla

***8–mannafør**: Klaksvíkingar stóðu seg betri, enn teir hava gjørt í mong ár*

Eingin ivi er um, hvat av 8–mannaførunum stóð seg best í níti árunum. Hagtølini siga, at Argjabáturin vann seks av tíggju FM heitum. Í fjør vóru argjamenn ov stuttir. Tá vóru tað grannarnir umborð á Ørvi hjá Havnar Róðrarfelag, sum vóru teir drúgvastu.

Á norðoyarstvnu vístu teir umborð á Argjabátinum, at teir ætla sær at taka FM heitið aftur. Og norðoyarstevnuróðurin boðaði eisini frá, at í ár fer Argjabáturin ikki at fáa nakra kapping frá Ørvi. FM manningin á Ørvi í fjør er farin umborð á Havnarbátin. Ørvur er mannaður av nýggjum, men teir hava vant í heilt stutta tíð, og tað hevði við sær, at teir á norðoyarstevnu endaðu á aftasta plássinum.

Mestu kappingina fekk Argjabáturin frá Toftabátinum, sum róðrarfelagið NSÍ mannar, og frá Nevinum Reyða úr Klaksvík. Martin Venned, sum tey bæði undanfarnu árini hevur verið venjari hjá teimum umborð á Eysturoyingi, har hann eisini var partur av manningini, rør við Nevinum Reyða. Hann tykist rættuliga at hava sett ferð í klaksvíkingarnar.

Avrikið á norðoyarstevnu boðar frá, at teir í Klaksvík hava ein bát, sum hevur møguleika at blanda seg í kappingina um fremsta plássið, og tað er akkurát tað, sum teir hava hildið skal til, um áhugin fyri kappróðri skal kveikjast av nýggjum í Klaksvík.

Umframt omanfyri nevndu manningarnar, so kann roknast við, at vestmenningarnir, sum manna fuglfjarðarbátin Gullbrand, fara at vera við í kappingini um fremstu plássini.

Oyndri luttók fyri fyrstu ferð í fleiri ár. Oyndfirðingar endaðu á fimta plássi.



*Sum tað sæst á myndini, so var Argjabáturin pura leysur av hinum bátunum, tá komið varð inn móti málinum*
***Mynd: Jonhard Hammer***

Teir vóru ikki serliga væl við í startinum, og tað kundi kanska boða frá, at tá tað fer at laga seg betri hjá teimum á fyrsta teininum, so verður møguleikin fyri betri endastøðu størri.

Umborð á Argjabátinum er nógv nýtt fólk. Tríggir av teimum, sum róðu við í fjør, rógva aftur í ár. Hinir eru allir nýggir, men teir vita allir,hvat tað snýr seg um, tí teir hava allir áður tikið lut í kappróðri.

Eitt sindur av fólki var í neystinum og tók ímóti, tá vinnarabáturin kom aftur til Argir. Onkuntíð hava tað verið fleiri til móttøkuna, og onkur helt fyri, at um Argjabáturin fer at halda fram at vinna, so far tey ivaleyst at fjølgast, sum fara at møta upp at taka ímóti.

JH



# Tjaldrið vardi heiðurin hjá Runavíkini

***5–mannafør dreingir:** At venja við einum gomlum báti og at kappast við einum nýggjum báti er sum dagur og nátt*

Av góður grundum var stórfingna móttøkan, sum Eysturoyingur hevur fingið í Runavík tvey tey seinastu árini, av ongum leygarkvøldið. Men best umboðaða økið í kappróðrinum kann gleða seg um, at róðrarframtíðin í Runavíkar kommunu tykist vera í góðum hondum.

Nýggi báturin hjá Róðrarfelagnum NSÍ, Tjaldrið, vann ein rudduligan sigur á norðoyarstevnu, og tað varð markerað við, at báturin, sum stóð uppi á einum lastbili, vitjaði í so at siga øllum bygdunum í kommununi, tá teir komu út aftur leygarkvøldið.

Tjaldrið stakk seg framum hinar bátarnar longu í startspurtinum, og tá hálvur teinurin var lagdur afturum, var tað leyst aftur til kappingarneytarnar. Ofta eru fremstu dreingjabátarnir komnir á mál í einum stórum trunka. Soleiðis var ikki hesa ferð. Tað var leyst frá Tjaldrinum og aftur til Havfrúnna. Og tað var leyst frá vestmannabátinum, sum vann FM í fjør, tá tað var hann, sum var spildurnýggjur, og aftur til Koll.

Hinir bátarnir vóru væl aftari, og tí er ilt at síggja, at kappingin um fremstu plássini fer at standa millum aðrar bátar enn teir omanfyri nevndu.



*Stoltleikin hjá Runavíkini er ikki longur Eysturoyingur. Tjaldrið bjargaði ænuni við at smyrja alla mótstøðu av*
***Mynd: Jonhard Hammer***

### Hava vant í gomlum báti

Gudmundur Danielsen er bátsformaður umborð á Tjaldrinum. Hann situr á toftini bakborðsmegin, og tískil var tað longu í startspurtinum, at hann sá aftur á hinar bátarnar, og tað var ein góð kensla. Umborð á Tjaldrinum er róðursmaðurin tann sami sum í fjør, og fýra av teimum seks, sum rógva, vóru eisini við í fjør. Tveir nýggir eru komnir umborð:

– Vit hava vant nógv. men tað var bara síðstu vikuna undan norðoyarstevnuni, at vit vóru umborð á Tjaldrinum. Báturin var ikki klárur. Tí hava vit vant við Ternuni. Tað er ein gamal og tungur bátur. Árarnar eru eisini tungar, og tí var tað ein heilt onnur kensla at koma umborð á ein spildurnýggjan og lættan bát. Tað er ein stórur fyrimunur at hava ein nýggjan bát, heldur Gudmund Danielsen.

Bátsformaðurin umborð á Tjaldrinum roknar avgjørt við, at teir á komandi stevnum fara at fáa kapping frá í hvussu so er Havfrúnni og Kolli.

Sigurin á norðoyarstevnu var tann fyrsti hjá teimum, sum nú rógva við Tjaldrinum. Í fjør vóru teir nummar trý á norðoyarstevnu, og tað var besta úrslitið hjá teimum i FM kappingini.

JH

# Sundalagið átti kappingina

***6–mannafør menn:** Hósvíkingurin noyddist at lúta fyri Hvessingi heilt stutt úr málinum*

Mest spennandi endaspurturin av øllum á norðoyarstevnu var tann hjá 6–mannaførunum við monnum. Hvessingur vann, men hann var bara ein hálvan skut fyrri á málið enn Hósvíkingur, og frá hósvíkingum og aftur til kollfirðingar var ikki leyst.

Í áttati árunum vann Hósvíkingur FM trý ár á rað – í 1985, 1986 og í 1987. Síðani tá hevur Hvessingur verið høvuðsbáturin í kappingini millum 6–mannafør við monnum. Hvessingur vann FM í fjør, og í níti árunum vunnu teir tilsaman fimm FM heiti.

Norðoyarstevnuróðurin boðaði frá, at kappingin í ár fer at vera ein uppgerð millum grannar. Næsti róðurin verður á Skálafjørðinum annan leygardag. Tá fer Hvessingur at hava Hósvíking undir aðrari liðini, og hann fer at hava Kollfirðing undir hinari liðini.



*Hvessingur vann 6-mannafarsróðurin hjá monnum, men teir fingu harða kapping frá grannunum í Hósvíkingi*
***Mynd: Jonhard Hammer***

Snopprikkur, sum vann FM í fyrraárið, legði bragdliga fyri, men tá startspurturin var liðugur, var hann dottin afturav og endaði aftastur.

Stórur spenningur var um, hvussu tað fór at hilnast hjá einasta spildurnýggja bátinum í kappingini, men Gongurólvur blandaði seg ikki í toppstríðið. Hann helt seg frammanfyri miðjuna inntil bátarnir vóru komnir inn á hálva Kósabrúnna. So rann Strálan av Strondum frá havnarmonnunum.

Á málinum var heilt stutt frá Kollfirðingi, sum endaði á triðja plássi, og aftur til Gongurólv á sætta plássi, og tað boðar frá, at í hesi kappingini fer tað ivaleyst at leika harðliga á seinni í summar.

JH

# Úrslit frá norðoyastevnu

*niðanfyri eru tilskilaðar endastøður og tíðir hjá bátsmanningunum, sum luttóku í kappróðrinum á norðoyastevnu*

**5-mannafør, dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Tjaldrið | 5.25,13 |
| 2 | Havfrúgvin | 5.32,24 |
| 3 | Kollur | 5.35,22 |
| 4 | Drekin | 5.43,01 |
| 5 | Sílið | 5.44,18 |
| 6 | Royndin Fríða | 5.47,07 |
| 7 | Spógvin | 5.48,23 |
| 8 | Blikur | 5.53,12 |
| 9 | Báran | 6.02,08 |
| 10 | Junkarin | 6.03,24 |

**6-mannafør, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 5.38,21 |
| 2 | Hvessingur | 5.46,20 |
| 3 | Fuglfirðingur | 5.50,16 |
| 4 | Gongurólvur | 5.53,02 |
| 5 | Sólmundur | 5.56,00 |
| 6 | Riddarin | 5.57,13 |
| 7 | Páll Fangi | 6.00,12 |
| 8 | Lómur | 6.01,13 |

**5-mannafør, gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Frúgvin | 5.29,16 |
| 2 | Beinta | 5.50,19 |
| 3 | Ørnin | 5.51,05 |
| 4 | Drekin | 5.51,07 |
| 5 | Hvassi | 5.54,22 |
| 6 | Sílið | 5.55,04 |
| 7 | Royndin Fríða | 5.55,18 |
| 8 | Havfrúgvin | 5.56,03 |
| 9 | Tjaldrið | 5.58,18 |
| 10 | Súlan | 5.59,21 |
| 11 | Fípan Fagra | 6.00,22 |
| 12 | Bylgjan | 6.02,04 |
| 13 | Firvaldur | 6.03,06 |
| 14 | Blikur | 6.05,06 |
| 15 | Spógvin | 6.13,03 |
| 16 | Dúgvan | 6.13,05 |
| 17 | Junkarin | 6.20,19 |

**6-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Hvessingur | 7.48,01 |
| 2 | Hósvíkingur | 7.48,15 |
| 3 | Kollfirðingur | 7.51,09 |
| 4 | Strálan | 7.53,04 |
| 5 | Gongurólvur | 7.54,05 |
| 6 | Sólmundur | 7.59,10 |
| 7 | Snopprikkur | 8.06,24 |

**8-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 7.33,20 |
| 2 | Toftabáturin | 7.36,20 |
| 3 | Nevið Reyða | 7.40,14 |
| 4 | Gullbrandur | 7.41,16 |
| 5 | Oyndri | 7.43,12 |
| 6 | Kviviksingur | 7.47,00 |
| 7 | Húsavíkingur | 7.49,00 |
| 8 | Miðvingur | 7.50,19 |
| 9 | Heiðabáturin | 7.53,05 |
| 10 | Ørvur | 7.58,13 |

**10-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Vestmenningur | 7.03,06 |
| 2 | Havnarbáturin | 7.04,18 |
| 3 | Nólsoyingur | 7.06,03 |
| 4 | Eysturoyingur | 7.06,11 |
| 5 | Vágbingur | 7.14,11 |
| 6 | Klaksvíkingur | 7.43,13 |